1991–2015

# Kariesskráseting

## Børn frá 5–15 ár




Tannlækna-
felagið

Heilsumálaráðið 2016

# Innihaldsyvirlit


| | | |
|---|---|---|
| Inngangur | | Síða 4 |
| Mynd I | Barnatenn í FO 1991–2015 | Síða 6 |
| Mynd II | Torleikastøðið í FO 1991–2015, barnatenn | Síða 7 |
| Mynd III | Vaksnamannatenn 1991–2015 | Síða 8 |
| Mynd IV | Torleikastøðið í FO 1991–2015, vaksnam.tenn | Síða 9 |
| Mynd V | Uppbýti av tannsjúkum í FO 1991–2015, barnatenn | Síða 10 |
| Mynd VI | Uppbýti av tannsjúkum í FO 1991–2015, vaksnam.tenn | Síða 11 |
| Mynd VII | Barnatenn, kariesstøðan kring landið 1991–2015 | Síða 12 |
| Mynd VIII | Vaksnamannatenn, kariesstøðan kring landið 1991–2015 | Síða 13 |
| Samandráttur og tilmæli | | Síða 14 |
| Orðafrágreiðing | | Síða 15 |

# **Inngangur** – eitt 25 ára skeið

Í 1991 byrjaðu tannlæknarnir í Føroyum at skráseta øll skúlabørn fyri tannsjúkur eftir altjóða reglunum hjá WHO. Sostatt er nú 25 ár síðani skrásetingin fyri alt Føroya land byrjaði. Hetta gevur nágreinilig tøl, ið lýsa tannheilsustøðuna hjá føroyskum børnum.

## Søguliga gongdin viðvíkjandi **skráseting** av tannheilsu í Føroyum

Í 1991, tá føroysku tannlæknarnir fóru undir skipaða skráseting av tannheilsuni hjá børnum og ungum í fólkaskúlanum, var lógin um barnatannrøkt[1] bert galdandi fyri 7–14 ára gomul børn.

Í 1998 víðkaðist lógin um ókeypis tannrøkt til eisini at fevna um smábørn í 0–6 ára aldri.[2]

Í 2015 víðkaðist lógin um ókeypis tannrøkt aftur til eisini at fevna um tey 0–17 ára gomlu.[3] Sostatt fáa nú øll føroysk børn og ung í aldrinum 0–17 ár tilboð um ókeypis tannrøkt.

Grundarlagið undir skipaðu skrásetingini er Sundhedsstyrelsens Cirkulære af 22. nov 1999 om indberetning på børne- og ungdomstandplejeområdet. Í kapittul 2, §4, stk. 2, stendur: „Indberetningspligten omfatter børn i alderen 5, 7, 12 og 15 år."

Føroyskir tannlæknar fylgja hesi lógargreinini.

## *„Fríska**r tenn** alt lívið"*

… er endamálið við at brúka nógva tíð, orku og fíggjarmegi upp á tannrøkt. Tá tey 17 ára gomlu, fara úr barnatannrøktini, heva góð 40 prosent av teimum púra fRískar tenn. Gloymast skal tó ikki, at nærum 60 prosent hava havt brendar tenn – í størri ella minni mun – og tí fingið fyllingar í tenninar. Fyllingarnar skulu síðani haldast viðlíka restina av lívinum. Hetta er ikki nøktandi, og arbeiðast má fram ímóti, at enn fleiri børn og ung varðveita frískar tenn alt lívið.

[1] Kongelig anordning nr. 454 af 7. juli 1986 om ikrafttræden på Færøerne af lov om børnetandpleje
[2] Løgtingslóg nr. 23, 6. mars 1998
[3] Løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 2014



| Frískar barnatenn | | |
|---|---|---|
| barnatenn | 1991 | 2015 |
| 5 ára gomul | 29 % | 74 % |
| 7 ára gomul | 9 % | 57 % |

| Frískar vaksnamannatenn | | |
|---|---|---|
| vaksnamannatenn | 1991 | 2015 |
| 7 ára gomul | 62% | 94 % |
| 12 ára gomul | 12% | 64 % |
| 15 ára gomul | 4% | 41 % |

Talið av børnum við frískum tonnum, t.e. tenn við ongum karies/holum, er alsamt vaksandi. Á taltalvuni omanfyri sæst, at í hesum 25 ára skeiðnum er tannheilsan alsamt batnað.

Norðurlendsk frágreiðing um tannheilsu frá 2011 vísir harumframt, hvussu nógv børn í Norðurlondum hava frískar tenn. Føroysk børn eru væl fyri, tá borið verður saman við børn úr hinum Norðurlondunum.

## Prosentpartin av børnum og ungum við frískum tonnum í **Norðurlondum** í 2011

| | 5 ár | 12 ár | 15 ár |
|---|---|---|---|
| Danmark | 83 | 70 | 50 |
| Føroyar | 63 | 58 | 30 |
| Finland | 53 | 42 | 20 |
| Ísland | 58 | 34 | 20 |
| Noregi | 81 | 55 | 18 |
| Svøríki | 74 | 61 | 30 |

*Kelda:* Quality indicators in oral health care: A Nordic project Proceedings in 2012, p.33

Sum tað sæst á talvuni høvdu 70 % av 12 ára gomlu børnunum í Danmark heilar og frískar tenn. Til samanberingar vóru í sama aldursbólki 58% av føroyskum børnum, ið eingi hol høvdu í tonnunum.

Í 2015 er talið av 12 ára gomlum føroyskum børnum við frískum tonnum økt til 64%.

Endamálssetningurin hjá føroyskum tannlæknum: "Frískar tenn alt lívið" er tó enn ikki rokkið fyri øll. Tí er tað alneyðugt framhaldandi at gera ábøtur og eldhugað stremba eftir framstigum í tannheilsuni hjá børnum og ungum í Føroyum. Fyrimunirnir við góðari tannheilsu eru eyðsæddir, og fyri einstaka borgaran eins væl og fyri samfelagið sum heild er fyribyrgjandi tannrøkt minni orkukrevjandi og bíligari enn tannviðgerð. Tann orkan, sum nú verður løgd í at fremja tannheilsuna hjá unga ættarliðnum, verður okkum væl afturlønt seinni.

## Mynd I

Barnatenn, def-s 5 og 7 ára gomul í Føroyum 1991–2015:




**Mynd I:** Defs-virðini[4]* (landsmiðaltøl) fyri barnatenn hjá 5, 7 og 12 ára gomlum eru skrásett.

**Niðurstøða:** Stabbamyndin vísir, at miðaltalið av holum í barnatonnunum hjá føroyskum børnum sum heild er minkað. Ein lítil minking er hjá teimum 12 ára gomlu, sum hava mist flestu barnatenninar við natúrliga tannfellinum.
Hjá teimum 5 og 7 ára gomlu, sum enn hava nógvar barnatenn, er talið av holum minkað munandi í tíðarskeiðnum 1991–2015.

[4] d: decayed, t.e. brendir tannflatar
e: extracted, t. e. trektar tenn (sv.t. 5 skaddar/vantandi flatar)
f: filled, t.e. fyltir/plumberaðir flatar
s: surfaces, t.e. tannflatar

* Lítil byrjunarstavur í styttingini dmfs merkir barnatenn. Sí eisini orðafrágreiðing á síðu 15



## Mynd II

Torleikastøðið.,[5] barnatenn, 5 og 7 ára gomul, 1991–2015:




**Mynd II:** Avmyndar „torleikastøðið," t.v.s, hvussu nógv børn eru ávikavist á:

- Støði 1 = Hava frískar tenn við ongum karies. Víst við óbrotnum (fullteknaðum) strikum.
- Støði 3+4 = Hava tenn við álvarsomum karies. Víst við brotstrikum.

Okkara mál er, at óbrotnu strikurnar skulu liggja so ovarlaga sum gjørligt, og brotstrikurnar so niðarlaga sum gjørligt. Vit vilja v.ø.o. stremba eftir, at torleikastøðið alsamt batnar.
Á strikumyndini sæst, at soleiðis hevur gongdin eisini verið í tíðarskeiðnum frá 1991–2015.

Kariesstøðið í barnatonnum verður sum heild minni álvarsamt í hvørjum, og tað merkir samstundis, at talið av børnum við frískum barnatonnum hækkar:

- Fyri 5 ára gomul (bláar strikur) vaks prosentparturin av børnum við frískum tonnum á støði 1 frá umleið 29% í 1991 til uml. 74% í 2015
- Fyri 7 ára gomul (reyðar strikur) fór parturin av børnum á støði 1 frá uml. 9 prosentum til uml. 57% í sama tíðarskeiðnum

Prosentparturin av børnum við brendum barnatonnum á støði 3 og 4 er harafturímóti støðugt minkandi:

- Fyri 5 ára gomul minkaði hann frá uml. 53 prosentum í 1991 til uml. 16% í 2015.
- Fyri 7 ára gomul fór hann frá uml. 82 prosentum til uml. 36% í 2015.

[5] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd III

Vaksnamannatenn, DMF-s 7, 12 og 15 ára gomul í Føroyum 1991–2015




**Mynd III** vísir DMFS-virðini[6]* (landsmiðaltøl) hjá 7-, 12- og 15 ára gomlum børnum í Føroyum frá 1991 til 2015.

**Niðurstøða:** Myndin vísir, at talið av brendum tannflatum á vaksnamannatonnum er minkað nógv fyri 7, 12 og 15 ára gomul. Frá 1991 til 1997 minkar talið skjótt, síðani gongur tað seinni, tó framhaldandi rætta vegin.

[6] D: decayed, t.e. brendir flatar
M: Missing, t.e. trektar tenn (sv.t. 5 vantandi flatar)
F : Filled, t.e. fyltir/plumberaðir flatar
S: surfaces, t.e. tannflatar

* Stórur byrjunarstavur í styttingini DMFS merkir vaksnamannatenn. Sí eisini orðafrágreiðing á síðu 15



## Mynd IV

Torleikastøðið7, vaksnamannatenn, 7, 12 og 15 ára gomul 1991–2015:




**Mynd IV** avmyndar „torleikastøðið,“ t.v.s, hvussu nógv børn eru ávikavist á:

- Støði 1 = Hava frískar tenn. Víst við óbrotnum strikum.
- Støði 3+4 = Hava tenn við álvarsomum karies. Víst við brotstrikum.

**Niðurstøða:** Ynskiligt er, at óbrotnu strikurnar skulu vera so ovarlaga sum gjørligt, og brotstrikurnar so niðarlaga sum gjørligt. Sum tað sæst á strikumyndini omanfyri, hevur hetta higartil eisini verið gongdin. Sum heild hækkar prosentparturin av børnum við púra ffrískum tonnum (støði 1) alsamt:

- Fyri 7 ára gomul (bláar strikur) fór prosentparturin frá uml. 62% í 1991 til uml. 95% í 2015
- Fyri 12 ára gomul (reyðar strikur) vaks prosentparturin frá uml. 12% til uml. 64% í nevnda tíðarskeiði
- Fyri 15 ára gomlum (grønar strikur) vaks prosentparturin hesa tíðina úr uml. 4% upp í uml. 41%

Prosentparturin av børnum við álvarsomum karies í vaksnamannatonnum (støði 3 og 4) er hinvegin í minking:

- Fyri 7 ára gomul minkaði prosentparturin frá uml. 8,5% í 1991 til 0,84 % í 2015
- Fyri 12 ára gomul fór prosentparturin frá 62% til 19,5% í sama tíðarskeiði
- Fyri 15 ára gomul fór prosentparturin hesa tíðina frá 75% til 40%

Ein góður triðingur av teim 15 ára gomlu høvdu púra frískar tenn í 2015.

[7] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd V

Býtið millum brendar, fyltar og trektar barnatenn 5 og 7 ára gomul, 1991–2015:




| | |
|---|---|
| d-s | brendar tenn |
| f-s | fyltar/plomberaðar tenn |
| e-s | trektar tenn |

**Mynd V:** Myndin vísir støðuna fyri barnatenn hjá 5 ára gomlum børnum (stabbarnir vinstrumegin) og hjá 7 ára gomlum (stabbarnir høgrumegin). defs-virðini[8] fyri barnatenn hjá nevndu aldursbólkunum báðum eru tald saman og mynda ein stabba fyri hvørt árið frá 1991–2015.

**Niðurstøða**: Stabbarnir eru í støðugari lækking, tí at bæði brendir tannflatar (bláur litur), fyltir tannflatar (reyður litur) og trektir tannflatar (grønur litur) fækka ár um ár. Við býtinum gongur tað soleiðis, at blái og reyði liturin í hvørjum stabba verða lutfalsliga rúgvismiklari enn grøni liturin, sum í 2015 fevnir um nógv størri part enn í 1991. Tað vil samanumtikið siga, at alt færri barnatenn verða trektar hjá 5 og 7 ára gomlum, og har við verða fleiri barnatenn sjálvsagt varðveittar, eisini hóast tær eru brendar. Varðveitsla av barnatonnunum hevur m.a. stóran týdning fyri, at vaksnamannatenninar koma fram á rætta plássið.

[8] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.



## Mynd VI

Býtið millum brendar, fyltar og trektar vaksnamannatenn 7, 12 og 15 ára gomul 1991 – 2015




| | |
|---|---|
| D-S | brendar tenn |
| F-S | fyltar/plomberaðar tenn |
| E-S | trektar tenn |

**Mynd VI:** Myndin vísir støðuna fyri vaksnamannatenn hjá 7 ára gomlum (stabbarnir uttast vinstrumegin), hjá 12 ára gomlum (stabbarnir í miðjuni) og hjá 15 ára gomlum (stabbarnir uttast høgrumegin). DMFS-virðini[9] fyri vaksnamannatenn hjá nevndu aldursbólkunum eru tald saman og mynda ein stabba fyri hvørt árið frá 1991 – 2015.

**Niðurstøða:** Stabbarnir vísa, at talið av brendum vaksnamannatonnum er støðugt minkandi, og tað er talið av trektum vaksnamannatonnum somuleiðis. Frá 1991 til 2015 er støðan batnað í øllum teimum skrásettu aldursbólkunum. Serliga hjá teimum 15 ára gomlu síggjast stór framstig, og gevur hetta góðar vónir um, at alt fleiri fólk sleppa at varðveita sínar egnu tenn í góðum standi alt lívið.

[9] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

# Kariesstøðan kring landið

## Mynd VII

Barnatenn, 7 ára gomul. defs-virði[10] frá 1991–2015
fyri einstøku kommununar og fyri alt landið:

- d-s brendar tenn
- f-s fyltar/plomberaðar tenn
- e-s trektar tenn




**Mynd VII** vísir kariesstøðuna fyri barnatenn hjá 7 ára gomlum børnum í ymsu kommununum í árunum 1991, 1996, 2001, 2006, 2014 og 2015.

Landsmiðaltølini eru ytst vinstrumegin, síðan koma miðaltølini fyri hvørja einstaka kommunu. Kommunurnar eru settar upp eftir postnummari við hækkandi tali frá vinstru til høgru.

**Niðurstøða:** Hóast miðaltalið av barnatonnum við karies er eitt sindur skiftandi frá einari kommunu til aðra og frá ári til ár, hevur gongdin fyri alt landið í tíðarskeiðnum frá 1991–2015 verið tann, at føroysk børn hava alsamt færri hol í barnatonnunum, og alt færri barnatenn verða trektar.

[10] Sí orðafrágreiðing s. 15



## Mynd VIII

Vaksnamannatenn, 12 ára gomul. DMFS-virði[11] frá 1991–2015
fyri einstøku kommununar og fyri alt landið:

- D-S brendar tenn
- F-S fyltar/plomberaðar tenn
- E-S trektar tenn




**Mynd VIII** vísir kariesstøðuna fyri vaksnamannatenn hjá 12 ára gomlum børnum kring landið í árunum 1991, 1996, 2001, 2006, 2014 og 2015.

Miðaltølini fyri alt landið eru ytst vinstrumegin, og síðan eru tølini fyri kommunurnar settar upp eftir postnummari sum í talvu VII.

**Niðurstøða:** Tølini fyri vaksnamannatenninnar í talvu VIII vísa líknandi framstig sum tølini fyri barnatenninnar í talvu VII. Úrslitini fyri kommunurnar eru ymislig og lækka ikki í beinum raði allastaðni. Tó er kariesstøðan munandi batnað í øllum økjum frá 1991 til 2015, og saman-umtikið fyri alt landið er nøgdin av karies minkað ár fyri ár í skrásetingartíðarskeiðnum.
Sama kann sigast um nøgdina av trektum vaksnamannatonnum (grøni parturin av stabbunum er mest sum burtur í nógvum økjum).

[11] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

# **Samandráttur** og tilmæli

Í 2014 varð viðtikið at broyta § 2 stk. 1 í verandi lóg um barna- og ungdóms tannrøkt soleiðis, at tey 16 og 17 ára gomlu eisini vóru fevnd av lógini um ókeypis barna- og ungdómstannrøkt. Sostatt fevnir lógin nú um øll børn millum 0 og 17 ár. Føroyar eru nú á sama støði sum hini Norðurlondini bæði viðvíkjandi tilboðum um tannrøkt til børn og ung og viðvíkjandi úrslitum, ið eru rokkin til frama fyri tannheilsuna sum heild.

Við støði í SEF-skrásetingini kann staðfestast, at tannheilsan hjá føroyskum børnum er í bata, men nógv kann gerast enn, so hon verður uppaftur betri. Ynskiligt er at minka munandi um kariestilgongdina. Serligur dentur má leggjast á at minka um talið á børnum við álvarsamari kariessjúku (torleikastøði 3-4) og at vaksa um talið á børnum, sum hava heilt frískar tenn (torleikastøði 1). Endamálið er, at so nógv sum yvirhøvur gjørligt fara úr barnatannrøktini við frískum og heilum tonnum.

Sum er, er ikki lógarkraft at skráseta tey 16- og 17 ára gomlu. Tískil eru ongi hagtøl fyri hesa árgangir og ikki gjørligt at hava tey við í kariesskrásetingini hesa ferð. SEF heitir tí á tannlæknarnar at skráseta tey 17 ára gomlu, so tey tølini kunnu vera tøk um 2 ár.

Ongi almenn hagtøl eru um tannheilsustøðuna hjá teim vaksnu í Føroyum. SEF-nevndin heldur tað vera umráðandi eisini at fáa hagtøl fyri henda bólk til vega. Vit hava fyrr umrøtt týdningin av hesum, men tíverri er onki hent enn. Heitt verður á privatu tannlæknarnar at arbeiða víðari við hesum málinum.

Ein leistur, ið kann nýtast til hetta endamál, er at skráseta ávísar árgangir. Í Danmark er avtala gjørd millum tannlæknar og Sygesikringen um, at hesir sjúklingar skulu skrásetast á hvørjum ári: Teir 25 ára gomlu, teir 40 ára gomlu og teir 65 ára gomlu.

Tað skuldi verið lagamanni hjá føroyskum tannlæknum at skrásett úrvaldar aldursbólkar, tí flestu telduforrit til tannlæknavirksemi gera vart við ávísu árgangirnar. Ynskiligt hevði verið at fingið hagtøl fyri kariesstøðuna hjá vaksnum sum heild, og fyri eitt nú talið av natúrligum tonnum, handilstonnum og implantatum. Annað, sum kundi verið áhugavert at skrásett, er t.d. sjúkur í tannhaldinum. Hesar sjúkur eru fremsta orsøk til, at eldri fólk missa tenninar. Fokus hevur seinastu árini verið á sambandið millum parodontitis og álvarsligar sjúkur so sum diabetes og hjarta-æðra-sjúkur.

Miðallivialdurin hjá fólki í okkara parti av heiminum er hækkandi. Soleiðis er eisini í Føroyum, og tí eiga fyribyrgjandi tiltøk, harímillum skráseting av tannheilsuni hjá vaksnum, at raðfestast frammarlaga, so fólk kunnu liva ikki bara leingi, men eisini væl við heilsugóðum tonnum sum einum natúrligum parti av heilsugóðum likami. Endamál okkara fyri barnatannrøktina og ynskið um skráseting av vaksnum til frama fyri tannheilsu teirra eru í fullum samsvari við altjóða endamálini hjá WHO viðvíkjandi tannheilsu og heilsu sum heild.[12]

SEF-frágreiðingin, ið er umbiðin av Heilsumálaráðnum, verður givin út annaðhvørt ár.

August 2016

Sigrid Arge og Unn Jakobsen

[12] http://www.who.int/oral_health/objectives/en/



# Orða**frágreiðing**

**SEF** (**S**jónlig **E**yðkennis **F**yribrygdi): Skráseting av tonnum, tannflatum, brendum tonnum, plombum, trektum tonnum/ tannflatum, vantandi tonnum, bitfeilum,tannhaldssjúkum v.m.

**DMFS /defs:** (stórir stavir = vaksnamanntenn / lítlir stavir = barnatenn).
**D/d:** „decayed" = brendir tannflatar.
**M/e:** „missing" / „extracted" = trektar tenn / tannflatar.
**F/f:** „filled" = plomberaðar tannflatar.
**S/s:** „surfaces" = flatar.

DMF**T**/def**t**: „tooth" = tonn (og ikki bara flati).

**Torleikastøði:** (á donskum sværhedszoner) = % talið av børnum, sum hava:

Støði 4 = (Hol í framtonnum og á sløttum flatum)
Allir flatar móti andliti og munnholu (uttan lagdir í jakslum og framtonnum)
Síðuflatar longst móti miðjuni á kinntonnum Allir síðuflatar á framtonnum
Støði 3 = (Hol á síðuflatum)
Allir síðuflatur á jakslum og framjakslum. Síðuflatar longst frá miðjuni á kinntonnum
Støði 2 = (Hol í natúrligum foyrum og lagdum)
Allir tyggiflatar
Allar lagdir á fram- ella baksíðu á jakslum og framtonnum
Støði 1 = (Einki hol)
Heilar og frískar tenn.

Barnatenninar eru 20 í tali og hava tilsamans 88 tannflatur.
Vaksnamannatenninar eru 28 í tali og hava tilsamans 128 tannflatur.
(vísdómsjakslarnir verða ikki taldir við).

**SCOR: S**undhedsstyrelsens **C**entrale **O**dontologiske **R**egister.
**OCR: O**ptical **C**haracter **R**ecognition.
**WHO: W**orld **H**ealth **O**rganisation: Heimsheilsustovnurin undir ST.

Keldur:

Føroysk SEF-tøl 1991–2015
Landsfólkayvirlitið 2008–2015
Nordisk kvalitetsmåling i sundhedsvæsenet, TemaNorden 2010:572
Postverk Føroya: Postøki/postnummur
Quality indicators in oral health care: A Nordic project. Proceedings in 2012
Sundhedsstyrelsens Indberetning på børne og ungdomstandplejeområdet, 1999
WHO Oral Health

Lógarverk:

Løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt.
Løgtingslóg nr. 39 frá 6.mai 2014 um broyting í lóg um barna- og ungdómstannrøkt

Heilsumálaráðið 2016

SENDISTOVAN